## Waldner meistari

Svenski borðtennisveteranurin, 44 ára gamli Jan-Ove Waldner, skuffaði ikki áskoðararnar, tá hann um vikuskiftið var heima í Halmstad og spældi um svenska meistaraheitið. Tað eydnaðist honum at vinna, og sostatt hevur hann vunnið SM heilar níggju ferðir. Fyrstu ferð var í 1983, og hann hevur bara eina ferð tapt eina SM-finalu – afturi í 1994.



## Nýggjur forseti

Tað er ikki bara í Føroyum, at útskifting er í hægsta sessi innan fótbólt, tí eisini í Norra var val um forsetasessin, tá norska fótbóltssambandið hevði aðalfund um vikuskiftið. Yngve Hallèn vann á Sondre Kåfjor við 186 atkvøðum ímóti 69. Hallèn er frammanundan dagligur leiðari í Sogndal Fotball, har fleiri føroyingar hava spælt.

### Neistin-Kyndil 34-27 (14-15):

# Kyndilin slóknaður

**Neistin spílaði seg ongan tíð út, men kortini høvdu teir merkiliga lætt við at vinna greiðan sigur á grannunum úr Kyndli**



jakup@sosialurin.fo
Jákup Mørk

Lagt var annars upp til eina spennandi grannauppgerð, har teir grønu høvdu alt at spæla fyri í royndunum at vinna seg fram til FM-finaluna. Og kanska eisini fyri at hevna tapið í steypafinaluni herfyri.

Og hampuliga leingi líktist dysturin eisini einum spennandi dyst, har Kyndil væl kundi fara við øllum.

Stóra vandamálið hjá Neistanum í løtuni er helst koddin, sum trygga finaluplássið kann gerast til, og fyri tað nógva høvdu nýkosnu steypavinnararnir ilt við at náa teimum heilt stóru hæddunum.

Tað hevði Kyndil kanska eisini, men uttan at talan varð um stórspæl, so var meira bit í teimum grønum, sum støðugt hildu seg eitt og tvey mál frammanfyri.

Seinasta korterið gekk tó heilt galið. Og okkurt kundi bent á, at orkan tá gekk undan hjá Kyndli.

Í øllum førum tók Neistin seg lættliga framum, og meðan Kyndil framdi mistøk og misnýtti góðar skotmøguleikar, tók Neistin uttan stórvegis hóvasták av í hinum endanum.

Og so gekk bara heilt galið hjá Kyndli. Máttloysi fekk av álvara fastatøkur á liðnum, og so kundi blái parturin av høllini fegnast um enn ein sigur, meðan grøni parturin í enn størri mun man ivast, um liðið veruliga hevur tað, sum skal til, fyri at røkka finaluplássinum, sum annars bæði hevur verið og er í eygsjón. Men skal tað eydnast, so skal avrikið lyftast eitt gott petti teir tríggjar dystirnar, sum eru eftir, áðrenn navn verður sett á finalistarnar.



Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

# Team Klaksvík flytur upp

Team Klaksvík tryggjaði sær seinnapartin í gjár uppflyting í bestu mansdeildina. Eftir sigurin á næstbesta liðnum hjá StÍF stóð greitt, at einki lið kundi fáa klaksvíkingar aftur á stigatalvuni. Úrslitið varð 31-24.

Klaksvíkingar hava ikki havt lið í bestu mansdeildini síðan fyrst í 90-unum, tá Stjørnan royndi seg millum teir bestu. Fá ár seinni gavst felagið við mannfólkahondbólti.

**uni**



**Manningin hjá Team Klaksvík, sum í gjár tryggjaði felagnum pláss í Atlantic Airways-kappingini**

Mynd: Norðlýsið